Musikandakt í Glyvra kirkju mánakvøldið

TILTØK
Vilmund Jacobsen

Mánakvøldið kl. 20.30 verður musikandakt í Glyvra kirkju.

Hetta er eitt tiltak, har høvið bæði verður at hoyra guðs orð, solosang og kirkjusang, har øll eru við.

- Eg vil siga, at hetta er ein sonevnd "oasa" í gerandisdegnum, har tað guðfrøðiliga, tónleikaliga og estetiska gongur upp í eina hægri eind, sigur presturin, Meinhard Bjartalíð.

Daisy Johannesen, sum er ættað úr Klaksvík og hevur lært at syngja bæði í Íslandi og Danmark, fer eitt nú at framføra "Bist du bei mir" hjá Johann Sebastian Bach og "Piu Jesu" hjá Gabriell Faure. Hon fer eisini at syngja onkran kendan sálm. Urgufylgispælið hevur presturin, Meinhard Bjartalíð.

Meinhard sigur, at nakrir felags sálmar verða eisini sungnir á musikandaktini mánakvøldið.

Á Glyvrum og í Rytuvík

Í fjør heyst og fjør vetur varð eisini skipað fyri musikandaktum, og til hesi tiltøk møtti væl av fólki.

Prestur sigur, at ætlanin er at hava 3 slík tiltøk í Glyvra kirkju og tvey í Rytuvíkar kirkju í heyst og í vetur. Ein musikandakt verður um mánaðin ella so.

- Øll eru hjartaliga velkomin, og her kunnu fólk leggja oyra til guðsorð umframt vakran sang og tónleik, sigur Meinhard Bjartalíð.

Eitt slíkt kvøld verður eisini ein kvirra í 2-3 minuttir. Hetta verður miðskeiðis undir musikandaktini, og tá kunnu fólk sjálvi biðja sína egnu bøn og annars hugsa um tað, sum hevur verið og fer at koma - ella, hvat fólk nú einaferð vilja nýta hesa kvirru til.

Mynd: Edvard Joensen

STARVSLÝSING

STARVSFÓLK TIL TELEFON-MÓTTØKUNA

Tryggingarfelagið Føroyar S/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn og 5 deildir kring landið. Tryggingarfelagið Føroyar selur allar tryggingar bæði til privatkundar og til vinnukundar. Í felagnum arbeiða uml. 120 fólk. Øll starvsfólk í felagnum fáa eina grundleggjandi tryggingarfakliga útbúgving, og verða viðariútbúgvin innan starvsøki teirra.

Elskar tú at tosa í telefon? Er svarið Ja, so er hetta starvið kanska nakað fyri teg!

Vit søkja eftir einum fólki til at røkja telefonmóttøku okkara. Tú kemur at arbeiða í einum toymi, har tú saman við góðum starvsfeløgum hevur ábyrgdina av, at fyrsta samskiftið við kundan er ein fragd.

Tínir persónligu eginleikar eru:
- Tær dámar væl at samskifta við øll fólk
- Tú hevur "smíl" í røddini
- Tú dugir væl at samstarva
- Tú ert álítandi og røkin

Tú verður ein sentralur persónur í arbeiðinum at náa telefonmálsetningum felagsins. Samstundis verður tú partur av einum nýggjum deildarumhvørvi, har neyðug útbúgving er ein náttúrligur partur av gerandisdegnum.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og AFF.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Henry Olsen, deildarstjóra, tlf. 345509 ella til Rannuá Leonsdóttir, tlf. 345600.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við viðkomandi skjølum innan tann 4. oktober 2002 til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postbox 329
FO-110 Tórshavn

SANSR TEL 355355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

6 ættarlið

Ofta hoyra vit um fýra og fimm ættarlið, men tað er ógvuliga sjáldan, at tað eru heili seks ættarlið. Men her er so ein stór familja savnað, og telur hon heili seks ættarlið.

Frá vinstru er tað Judith Jacobsen, sum er mamman, Poula Jacobsen, omma, Ása Udbø, langomma, Julianna Didriksen, olduromma og Meinhard Johansen er tipoldurabbabeiggi. Tað er hann, sum situr undir yngsta ættarliðnum, Mirjam Samuelsen.

Tøkk

Hjartaliga takki eg fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða dóttir mín

Beinta Bærendsen Strøm

andaðist og varð jarðað.

Stóra tøkk til heimarøktina og tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum vóru um hana.

Tøkk til prest fyri vøkur og troystarrík orð, kirkjutænarar, sangarar, gravara.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Krabbameins- og Heilafelagið. Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Eisini ein serlig tøkk til tykkum mongu, sum á ein og annan hátt, hjálptu til við ervinum.

Solveig

Ein hædd afturat í SMS

Umvælingararbeiðið í SMS í er nú um at verða liðugt, og lata handlarnir upp í nýggjum hølum komandi mikudag

HANDILSLÍV
Eirikur Lindenskov

Komandi mikudag letur norðrari parturin av SMS upp – tann parturin, sum seinastu mánaðirnar hevur verið stongdur vegna umbygging.

Og tað eru stórar broytingar, sum farnar eru fram í Sølumiðstøðini í Havn. Umframt handlarnar Benneton, Klivan, Mango, Sportmaster og Skálk, sum lata upp í nýggjum hølum, verða eisini trý matstøð í nýggju hølunum. Tey lata tó ikki upp fyrr enn 9. oktober.

SMS er ofta bygt um og út, síðani latið var upp á fyrsta sinni tann 2. november í 1977. Men hesaferð er talan um eina rættuliga stóra umbygging.

Nú er bygt oman á Sølumiðstøðina, soleiðis at skilja, at ein reising er gjørd tvørtur ígjøngum tvær tær ovastu lonirnar. Hetta gevur gott ljós inni í høllini, og tá svalar eru gjørdir framvið, er í veruleikanum talan um eina heila hædd afturat. Nú gongur tú framvið handlunum í erva, sum eru undir teimum fýra ovastu lonunum.

Niels Mortensen, stjóri í SMS sigur, at ætlanin í framtíðini er, at hendan gongin í erva skal fórast allan vegin suður gjøgnum bygningin.

Niels Mortensen, stjóri í SMS á svalanum framman fyri handlarnar, sum fara at halda til »á loftinum« í SMS. Góðu ljósviðurskiftini og litirnir gera tað mundandi ljósari inni í SMS *Mynd Jens Kristian Vang*

Vetrarferðatilboð 14.09.2002 - 10.05.2003

The North Atlantic Link

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum.

Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrönu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

Ebeltoft (myndin) · **Blokhus** · **Hirtshals**

4.995,- *gisting 7 nætur*

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fáborg, Rudkøbing, Østersøen – Møn, Blåvand og Bornholm.

Shetland Cruise

	4-koyggjuk. við WC/bað	2-koyggjuk. við WC/bað
Grand-/Queens Hotel	1.550,-	1.730,-
Shetland-/Lerwick Hotel	1.690,-	1.870,-
Herrislea House Hotel	1.550,-	1.730,-
Privat Gisting	1.280,-	1.460,-
Vallaraheim	1.010,-	1.190,-

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

	4-koyggjuk. við WC/bað	2-koyggjuk. við WC/bað
Grand-/Quenns Hotel	4.100,-	4.280,-
Shetland-/Lerwick Hotel	4.940,-	5.120,-
Herrislea House Hotel	4.100,-	4.280,-
Privat Gisting	3.220,-	3.400,-
Vallaraheim	2.030,-	2.210,-

Easterhoull Chalets
í vika í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bíli

	4-koyggjuk. við WC/bað
Hús við 2 rúmum	4.940,-
Hús við 3 rúmum	5.630,-

Pakkaferð við gisting á hotelli
2 ferðandi í bíli, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm
fyri hvonn **3.290,-**
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari v. WC/bað. Uppihald: 7 nætur á Hotel Hanstholm í dupultkamari við WC/bað. Á hotellinum er morgunmatur íroknaður.

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 3. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bíli Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað **2.990,-**

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 3. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bíli Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað **2.200,-**

SMYRIL LINE

e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00



Inet CLASSIC

- Stovnan: **Ókeypis**
- Mánaðargjald: **0,-**
- Tú sleppur á alnótina frá øllum teldum, ið hava telefonsamband
- Inet-hjálp frá kl. 08 - 20 á Tel **902121** *

Við Inet CLASSIC fært tú eisini virusskannað allan tín teldupost; pláss á ambætaranum hjá Føroya Tele til tína egnu heimasiðu; atgongd til allar upplýsingar um tína nýtslu á alnótini.
*Inet-hjálpin svarar millum kl. 08 - 20 og kostar 5 kr/min kl. 08 - 18 og 8,75 kr/min kl. 18 - 20 umframt uppringingargjald á 5 kr.

Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

Inet INTERNETLOYSNIN

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum